# Uppskot til virkisætlan fyri ein brekað-politikk í Føroyum og Frágreiðing um virksemið í Ári teirra brekaðu 2003



Frá stýrisbólkinum fyri Ár teirra brekaðu 2003. Almannakunngjørt 3. desember 2004

# Innihaldsyvirlit


Uppskot til virkisætlan frá Stýrisbólkinum fyri Ár teirra brekaðu 2003 ........ 3
Formæli ........ 3
Atkoma ........ 6
Tilmæli um atkomu: ........ 7
Sektor-ábyrgd ........ 8
Tilmæli um sektor-ábyrgd: ........ 9
Bústaðarmøguleikar ........ 10
Tilmæli um bústaðarmøguleikar: ........ 11
Útbúgving ........ 12
Tilmæli um útbúgving: ........ 13
Arbeiðsmarknaðurin ........ 14
Tilmæli um arbeiðsmarknaðin: ........ 15
Viðgerð ........ 16
Tilmæli um viðgerð: ........ 17
Tilmæli um raðfesting ........ 18
Eftirmæli ........ 18
Frágreiðing frá stýrisbólkinum um Ár teirra brekaðu 2003 ........ 19
Inngangur ........ 19
Summarstevnur í 2003 ........ 23
Annað virksemi ........ 24
Evnisdagur fyri fakfólk, sum hava við børn, ið bera brek, at gera. 23. oktober 2003 ........ 26
Spurnarkanning um atkomu hjá rørslutarnaðum í kommununum ........ 28
Evnisdagur um rættindi hjá brekaðum og fyrimyndarreglurnar hjá ST fyri fólk, ið bera brek ........ 32
Tiltøk, sum fingu stuðul frá landsstýrismanninum í almannamálum eftir tilmæli frá stýrisbólkinum ........ 33
Spurnarblað um atkomumøguleikar hjá rørslutarnaðum ........ 35

# Uppskot til virkisætlan frá Stýrisbólkinum fyri Ár teirra brekaðu 2003

## Formæli

Sambært metingum hjá Heimsheilsustovninum WHO bera umleið 10% av íbúgvunum í einum landi størri ella minni brek. Hetta er ein stórur minniluti, sum hevur ein fjølbroyttan og víðfevndan tørv á tilboðum. Samfelagið hevur skyldu til at ganga hesum tørvi á møti og til at lúka tey krøv, sum tað setur at hava eitt vælferðarsamfelag, ið er fyri øll.

Fólk, ið bera brek, eiga so langt sum gjørligt at verða integrerað í samfelagið. Fyri at fremja hetta, er neyðugt at gera eitt arbeiði, sum er væl samskipað tvørtur um teir ymisku sektorarnar í samfelagnum. Fyri at fáa sum mest burturúr, er ráðiligt, at myndugleikarnir arbeiða eftir eini ætlan, sum røkkur fram í tíðina, heldur enn at finna løtuloysnir, at sløkkja eldar. Tað, sum í stóran mun enn eyðkennir tað almenna virksemið í Føroyum innan brekað-økið, er, at loysnirnar kunnu tykjast nakað stuttfreistaðar. Tann stóra heildin verður ikki havd í huga. Hetta er aloftast av neyð, tí tað ber sjálvdan til at bíða við at loysa teir mangan sera álvarsligu trupulleikarnar, sum alla tíðina stinga seg upp á hesum økinum.

Vit hava í stóran mun tikið støði í fyrimyndarreglunum hjá ST um at veita fólki við breki javnlíkar møguleikar. Hesar fyrimyndarreglur eru ein altjóða góðkend stevnuskrá, sum eigur at vera politiskt og moralskt bindandi í teimum londum, sum hava góðtikið hesar reglur. Og tær eru samstundis eitt sera ítøkiligt og gagnligt amboð at nýta í arbeiðinum at bøta um viðurskifti teirra brekaðu.

Eftir okkara tykki eru trý grundleggjandi hugtøk neyðug at arbeiða við, tá ið talan er um brekað-politikk. Hesi eru:

- **Betri tilvitska** – neyðugt er at upplýsa um viðurskifti, sum viðvíkja brekaðum, so at fólk verða tilvitað. 1. regla í fyrimyndarreglunum hjá ST hevur heitið Betri tilvitska og ljóðar soleiðis: *Tjóðir hvør sær eiga at bera so í bandi, at betri kunnleiki verður í landinum um*

*brekað fólk, rættindi og tørv teirra, íkast teirra og menningarmøguleikar teirra* (…) *Tjóðirnar hvør sær eiga at fara undir og stuðla upplýsingarherferðum viðvíkjandi brekaðum fólki og politikki teirra brekaðu, sum ber fram tann boðskap, at brekað fólk eru borgarar við somu rættindum og skyldum, sum aðrir borgarar, og sostatt hava rætt til tiltøk, sum beina burtur allar forðingar, sum tarna teimum í at vera uppi í øllum.*

- **Langtíðarráðlegging** – neyðugt er, at spurningar, sum viðvíkja brekaðum, verða tiknir við í eitt arbeiði frá byrjan. Tað ber til at finna loysnir, sum gera alt samfelagið rúmligari, og ofta skal ikki so nógv til. At koma aftur umaftur við einari loysn ger ofta arbeiðið óneyðuga kostnaðarmikið.

- **Fígging** – tað er ikki ókeypis at tryggja øllum borgarum somu rættindi í einum vælferðarsamfelagi. Hinvegin lønar tað seg, eisini frá einum samfelagsligum sjónarmiði, at gera tær røttu íløgurnar, so at fólk, ið bera brek, fáa betri umstøður. Hvørjar treytir eitt samfelag býður sínum førleikatarnaðu borgarum, er, tá ið samanum kemur, ein spurningur um politiska raðfesting og politiskan vilja.

Ein virkisætlan er ein sera fín javnvág millum ov nógv og háfloygd orð øðrumegin, og ítøkilig úrslit hinumegin. Hendan vandan eru vit vitandi um, men vit halda tað vera neyðugt við eini virkisætlan fyri politikkin á brekað-økinum.

Gjógvin millum tørv og veruleika er enn ov djúp fyri nógv fólk, ið bera brek. Vit eiga at menna meginregluna um, at allir myndugleikar skulu taka brekað-politikkin við í alt teirra arbeiði. Og um tað besta skal spyrjast burturúr, er tað hent at hava ein yvirskipaðan leist at arbeiða eftir.

Í hesum uppskoti til virkisætlan hava vit valt at seta fokus á 6 ymisk øki: atkomu, sektor-ábyrgd, bústaðarmøguleikar, útbúgving, arbeiðsmarknað og viðgerð. Vit vita, at hetta langt frá er nokk. Hinvegin er neyðugt at byrja onkustaðni. Tí tað er mangur leikur í longum talvi.

Vónandi røkka vit við hesum uppskoti til virkisætlan longur áleiðis fram ímóti **tí atkomuliga samfelagnum** – einum samfelag, sum gevur sínum borgarum við avmarkaðum førleika møguleika at fáa eina góða tilveru og at luttaka í samfelagsvirkseminum á jøvnum føti við aðrar borgarar.

Vón okkara er, at hetta uppskot til virkisætlan verður ein liður í arbeiðinum at tryggja fólki, ið bera brek, atkomu og jøvn rættindi í tí føroyska samfelagnum.

Vegna stýrisbólkin fyri Ár teirra brekaðu 2003

Doris Hansen, fyri Mentamálaráðið. Forkvinna í stýrisbólkinum
Malan Johansen fyri Vinnuhúsið
Ingeborg Vinther fyri Føroya arbeiðarafelag
Suni Dalsgaard fyri Landsverkfrøðingin
Marjun Sigurðsdóttir fyri MBF
Steinbjørn Jacobsen fyri Ráðið fyri brekað 2002
Kristianna Winther Poulsen fyri Almanna- og heilsumálaráðið

## Atkoma

**5. regla í fyrimyndarreglunum:**
**Tjóðirnar hvør sær eiga at viðurkenna tann almenna týdning, atkoma hevur í arbeiðinum fyri, at øll skulu hava somu møguleikar á øllum økjum í samfelagnum. Fyri fólk, sum hava brek av øllum slag, eiga tjóðirnar hvør sær a) at seta í verk ætlanir, sum gera umhvørvið atkomuligar; og b) at skapa fortreytir fyri, at øll kunnu koma til upplýsing og samskifti.**

Atkoma er ein avgerandi treyt fyri, at fólk við avmarkaðum førleika kunnu taka lut í øllum pørtum av teirri menniskjansligu tilveruni. Hugsað verður her um atkomu í orðsins víðastu merking.

Tað, ið verður bygt í dag, er í størstan mun atkomuligt fyri rørslutarnað. Men stórur partur av eldri bygningum er afturlatið økið fyri hesi fólk. Tað almenna skal eisini her ganga á odda. Tað eigur at vera álagt, at allir bygningar, sum hýsa almennum virksemi, skulu skipa soleiðis fyri, at øll fáa atgongd.

Seinastu árini hava vit sæð, at lyftur og rampur eru settar upp í ymsum bygningum at betra um atkomumøguleikarnar. Hetta eigur at verða gjørt í nógv størri mun enn nú. Ein orsøk, ið altíð verður havd á lofti, er, at eingin fígging er tøk til hetta arbeiðið. Hendan fígging eigur at verða sett á fíggjarlógina og oyramerkjast: Atkoma. So skal bera til at søkja um at fáa pening til at betra um atkomuna.

Tá farið verður undir at byggja, skal byggjast soleiðis, at øll hava atkomu til bygningar, ið hýsa virksemi, sum er alment. Lóggevast skal fyri hesum.

Lóggevast skal fyri, at samferðslukervið verður gjørt atkomuligt fyri øll. Tað skal bera til fyri øll, eisini fyri fólk við rørslutarni, at ferðast kring allar Føroyar, bæði á landi, á sjógvi og í luftini.

Heimasíður skulu vera atkomuligar. Tað skal vera gjørligt at fáa fram størri stavir. Eisini eigur tað at vera gjørligt at fáa tekstin lisnan hart. Tá tað føroyska teldumálið, sum Blindastovnurin og

Fróðskaparsetrið arbeiða við, verður liðugt, eigur hendan funktiónin at vera á øllum almennum heimasíðum.

Lesiveik skulu hava atgongd til almennar upplýsingar. Hetta verður gjørt við at seta saman tilfar við almennum upplýsingum á ein lætt skilligan hátt. Eisini eigur at vera havt í huga, at ein skipan við teknmyndum kann verða nýtt.

Blindskrift eigur at verða nýtt, fyri at geva blindum og sjónveikum betri atgongd til almennar upplýsingar.

Teknmálstulking eigur at vera ein natúrligur partur av øllum almennum tiltøkum, so deyv og tunghoyrd fáa gleði av hesum. Eisini eigur teleslynga at vera á støðum, har fyrilestrar, fundir, sjónleikir, gudstænastur osfr. verða hildin.

## Tilmæli um atkomu:

- **Politisku myndugleikarnir eiga at syrgja fyri, at atkoma verður betrað.**
- **Ein byggilóg, sum hevur fyrilit fyri tí fjølbroytta tørvinum hjá fólki, ið bera brek, eigur at verða gjørd.**
- **Atkoma til bygningar, ið hýsa almennum virksemi, atkoma til samferðslukervið, og atkoma til lendið verða tryggjaðar við lóg.**
- **Atkoman til annað virksemi verður tryggjað við hóskandi loysnum, so sum teleslyngum, teknmálstulking, teksting, lætt skilligum teksti og teknmyndum.**
- **Atkoma til heimasíður og annan KT-útbúnað verður tryggjað við at syrgja fyri hóskandi KT-loysnum, so at øll fáa so góðan lut sum til ber í framgongdini á KT-økinum.**

## Sektor-ábyrgd

**Í innganginum til fyrimyndarreglurnar:**
**Grundreglurnar um somu rættindi bera í sær, at tørvurin hjá hvørjum einstaklingi er líka týdningarmikil, at hesin tørvur má leggjast sum grund undir allari ráðlegging í samfelagnum, og at alt tilfeingi má verða brúkt, soleiðis, at tað tryggjar, at øll hava somu møguleikar til at vera uppi í øllum.**

Sektor-ábyrgd merkir, at ábyrgdin av at veita fólki við breki ymsar samfelagstænastur, er býtt sundur á teir ymsu sektorarnar í samfelagnum. Tað vil siga, at tann myndugleiki ella stovnur, sum hevur ábyrgd av at veita borgarum tænastur, hevur ábyrgd av at tryggja, at hesar tænastur eisini verða atkomuligar fyri fólk, ið bera brek. Hendan ábyrgd fevnir eisini um fígging av hesum tænastum.

Í øðrum londum verður í dag kjakast um, hvørt sektor-ábyrgdin er ein gongd leið ella ikki. Vandi er fyri, at teir ymisku stovnarnir skúgva fólk við breki frá sær við sektor-ábyrgdini sum umbering, og at fólk detta niður ímillum tey ymisku økini.

Hesin trupulleikin er eisini kendur í Føroyum. Í einum áliti, sum ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri Mentamálaráðið, fyri táverandi Familju- og heilsumálaráðið og Almannamálaráðið umframt fyri MBF handaði sínum aðalstjórum í 2003, varð gjørt vart við grásonu-trupulleikan: at aðalráð vísa fólki frá sær til onnur, tí tey meta, at trupulleikin ikki hoyrir heima hjá teimum, men at okkurt annað aðalráð eigur at loysa trupulleikan. Hetta er ein av vansunum við sektor-ábyrgd, sum eigur at verða tikin í størsta álvara.

Reglan um sektor-ábyrgd skal ikki standa einsamøll í tí almenna brekað-politikkinum. Hon skal styðja uppundir og betra aðrar fyriskipanir, sum finnast í dag. Men týdningarmikið er, at øll stjórnarráðini eru tilvitað um sektor-ábyrgdina.

Tilmælini í grásonuálitinum skulu takast við í arbeiðið fyri at fremja sektor-ábyrgd í Føroyum.

## Tilmæli um sektor-ábyrgd:

- **Politisku myndugleikarnir eiga at syrgja fyri, at sektor-ábyrgd verður framd í Føroyum.**
- **Hetta kann gerast við at lógaráseta um hesa ábyrgd, ella við at seta pening av á fíggjarlógini, sum er oyramerktur til at tryggja sektor-ábyrgd.**
- **Harumframt eiga myndugleikarnir at arbeiða fyri at avmarka grásonu-trupulleikarnar í mest møguligan mun, við at ráðharrabólkurin, sum varð stovnaður í 2004, tekur mál upp og loysir tey, so eingin dettur niður ímillum skipanirnar.**

## Bústaðarmøguleikar

Sámilig bústaðarviðurskifti hoyra til tann mest grundleggjandi tørvin hjá menniskjanum. Atgongd til ein hóskandi bústað er ein fortreyt fyri eini góðari tilveru. Fólk við avmarkaðum førleika skulu, eins og onnur, kunna velja bústað í samsvari við egnan tørv og egin ynski.

Tað er týdningarmikið, at tað almenna hjálpir einstaklingunum at útvega sær bústað, um tey ikki sjálvi eru før fyri at gera hetta. Fólk, ið bera brek, hava so at siga ongan møguleika at seta búgv í Føroyum í dag. Orsøkirnar til hetta eru bæði praktiskar og fíggjarligar. Vit vita, at tørvurin á bústøðum til fólk, ið bera brek, er sera stórur. Vit vita eisini, at hann er sera fjølbroyttur. Fyri summi er besta loysnin at búgva á sambýli við starvsfólkum, sum eru til hjálpar í gerandisdegnum. Hinvegin eru tað onnur, sum eru sjálvbjargin, men sum orsakað av likamligum breki hava tørv á einum bústaði, har ongar forðingar eru fyri atkomu.

Fólk við avmarkaðum førleika skulu havast í huga í arbeiðinum at gera føroyska bústaðarmarknaðin fjølbroyttari.

### Fígging

Tað almenna eigur at veita fólki, ið bera brek, hóskandi fíggingarmøguleikar, so tey kunnu fáa ein bústað. Um fólk fáa fyritíðar-pensjón orsakað av breki, hava tey ongan møguleika at seta búgv. Tey skulu hava atgongd til bústaðarfígging við lagaligum treytum.

### Stovnsøkið hjá Serforsorgini

Serforsorgin skal framhaldandi reka bústaðir hjá fólkum við teimum mest víðfevndu brekunum.

Fyri at nøkta bústaðartørvin innan stovnsøkið hjá Serforsorgini, er neyðugt at gera eina langtíðarætlan fyri, hvussu hesir bústaðir verða bygdir. Vit hava tey seinastu 20 til 25 árini sæð, at loysnin við sambýlum verður alt meira brúkt. Tíverri tykist framferðarhátturin á hesum øki at vera merktur av tilvild, ella eldsløkking: eini hóskandi sethús eru til sølu, peningur er tøkur á fíggjarlógini, og tað eru fólk í hópatali, sum eru til reiðar at flyta inn. So verður eitt sambýli sett á stovn. Tað ber til at hækka góðskuna og lækka almennu útreiðslurnar, um virksemið á hesum økinum verður betur skipað.

Almanna- og heilsumálaráðið eigur saman við Serforsorgini, MBF og kommunufeløgunum at gera eina langtíðarætlan fyri, hvussu bústaðarøkið hjá Serforsorgin skal skipast.

**Aðrir bústaðir**

Tað eru nógv fólk, sum bera brek, men sum ikki hoyra undir Serforsorgina. Hesi fólk kunnu, orsakað av brekinum, vera fyritíðarpensjónistar, ella arbeiða niðursetta tíð, og tískil hava avmarkaða inntøku. Fyri at hesi fólkini skulu hava nakran møguleika at fáa ein bústað, er neyðugt við eini skipan, ið veitir lagaligar fíggingarmøguleikar til fólk, ið bera brek.

Atkoman er og verður ein grundleggjandi treyt fyri, at fólk við rørslutarni kunnu fáa bústað. Í hesum sambandi eru tað ávís krøv til, hvussu byggjast skal.

- Tað almenna eigur at skipa fyri serligari húsabygging, har fólk, ið bera brek, hava ávísan framíhjárætt til ein ávísan part av bústøðunum. Eitt ávíst tal av íbúðum, til dømis 20 %, kann verða oyramerkt til fólk við breki. Tað er tó týdningarmikið, at hendan skipanin ikki endar við ”getto-gerð”, at ein hópur av fólki, hvørs einasti felagsnevnari er, at tey bera brek, fær ávíst bústað í sama, avmarkaða øki.

## Tilmæli um bústaðarmøguleikar:

- **Bústaðarmarknaðurin skal gerast fjølbroyttari, so at eisini fólk við serligum tørvi vegna brek fáa møguleika at velja bústað.**
- **Ein almennur bústaðarpolitikkur eigur at verða orðaður, sum hevur fyrilit fyri øllum landsins borgarum**
- **Fíggingarmøguleikarnir verða lagaligari enn í dag.**
- **Útboðið verður fjølbroyttari, við atkomuligum bústøðum.**

## Útbúgving

**6. regla í fyrimyndarreglunum:**
**Tjóðirnar hvør sær eiga at viðurkenna regluna um somu undirvísingartilboð og innliman (innklusión) í barnaskúla,ungdómsundirvísing og hægri útbúgving við somu møguleikum fyri børn, ung og vaksin, sum eru brekað. Tær eiga at tryggja, at útbúgving teirra brekaðu er ein innlimaður partur í útbúgvingarskipanini.**

Av tí serliga samskiftistørvi, ið deyv og deyvblind fólk hava, er tað betur hóskandi, at teirra útbúgving verður í serligum skúlum, sum eru ætlaðir til tess, ella í serflokkum ella - eindum í vanliga skúlaverkinum.

Tey seinastu 30 árini hevur verið tosað um "skúlan fyri øll". Hetta hugtak byggir á ta hugsjón, at øll menniskju hava sama virði, tað sama um tey bera brek ella aðrar ójavnar. Við fólkaskúlalógini frá 1979 fingu øll børn rætt til at ganga í skúla í nærumhvørvinum, um foreldrini høvdu ynski um tað. Saman við broyttum hugburði hevur hetta havt við sær, at flestu næmingar í dag, eisini teir, ið bera brek, eru í vanliga fólkaskúlanum, meðan næmingatalið í skúlanum í Sernámsdeplinum er minkandi.

1. Í 2000 var ein arbeiðsbólkur settur at kanna serundirvísingarskipanina og koma við tilmæli um broytingar. Arbeiðsbólkurin lat álitið "Tilmæli um sernámsfrøði" úr hondum í juni 2001. Í tilmælinum var mælt til at gera grundleggjandi broytingar í skipanini og at gera eina lóg um sernámsfrøði. Hesum verður arbeitt við í løtuni.

Fyri flestu fólk við breki, ið hava tørv á nógvari hjálp og viðgerð av ymsum slagi, er tað neyðugt at arbeiða tvørfakligt og eftir eini heildarætlan, ið fakfólk saman við foreldrum ella persóninum sjálvum eru samd um. Samstarv má skipast millum Mentamálaráðið og Almanna- og heilsumálaráðið um hesi viðurskifti. Ein verkætlan eigur at verða gjørd um, hvussu eitt tílíkt tvørfakligt samstarv kann fara fram, og hvussu arbeitt kann verða eftir eini heildarætlan.

**Smábørn við serligum tørvi**

Sambært fólkaskúlalógini frá 1979 kann Sernámsfrøðiliga Ráðgevingin veita sernámsfrøðiliga hjálp til børn undir skúlaaldur. Børn við serligum tørvi eru sera ymisk. Tey kunnu hava tali-/hoyritrupulleikar, hava menningar- og sálarligar trupulleikar, rørslubrek ella atferðartrupulleikar fyri at nevna nøkur dømi. Tað hevur týdning, at børnini fáa sernámsfrøðiliga hjálp og stuðul so tíðliga sum gjørligt. Fyri nøkur merkir tann hjálpin, tey fáa, áðrenn tey fara í skúla, at trupulleikarnir eru burtur, tá tey koma í skúla, onnur mugu fáa hjálp í langa tíð, ja kanska øll skúlaárini og longri við.

Á Sernámsdeplinum er ein barnagarður, ið bæði tekur sær av eygleiðing av børnum, ið eru ávíst av lækna, heilsusystrum, foreldrum ella dagstovni og hevur nøkur børn, ið koma regluliga í barnagarð har. Spurningurin hevur nú tikið seg upp, um Mentamálaráðið hevur heimild til at hava stovnar til børn undir skúlaaldur undir sær. Hetta mál eigur at loysast við Almanna- og heilsumálaráðið. Ein annar spurningur er, hvør skal undirvísa teimum stuðlum, ið eru um børn, ið bera brek – bæði undir og í skúlaaldri.

## Tilmæli um útbúgving:

- **Samstarv má skipast millum Almanna- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið um tvørfakligt samstarv og eina heildarætlan**
- **Atkomuviðurskiftini mugu vera í lagi á øllum útbúgvingarstøðum.**
- **Fólk við breki eiga at fáa mótvirði fyri tí førleikatrupulleika, tey hava**
- **Nøkur fólk kunnu ikki klára seg í undirvísingarhøpi uttan fylgjara/stuðul. Mett verður í hvørjum einstøkum føri um, hvussu nógvum stuðli tørvur er á.**
- **Deyv hava serligar samskiftistrupulleikar. Deyvir næmingar skulu undirvísast á teknmáli í fólkaskúlanum. Tulkur eigur at vera til taks til framhaldandi útbúgving.**
- **Fjølbroytt tilfar má fáast til vega, ið hóskar til tann einstaka næmingin.**

## Arbeiðsmarknaðurin

**7. regla í fyrimyndarreglunum:**
**Tjóðirnar hvør sær eiga at viðurkenna ta meginreglu, at brekað fólk mugu fáa møguleikan fyri at útinna síni mannarættindi, serliga hvat arbeiði viðvíkur. Bæði á bygd og í býi mugu tey fáa somu møguleikar til vinnuskapandi og lønandi arbeiði á arbeiðsmarknaðinum.**

Arbeiðsmarknaðurin skal gerast rúmligari. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga, saman við tí almenna, at bjóða fólki, ið bera brek, vælkomnum, bæði sum arbeiðsmegi og sum arbeiðsfelagar. Sum hjá øllum øðrum er neyðugt hjá hesum bólki at breyðføða sær og sínum. Eisini eiga tey at fáa møguleika at taka lut í tí sosiala felagsskapi, sum eitt arbeiðspláss ofta er.

Tað er ikki ráðiligt, at fólk, sum kunnu og vilja arbeiða, verða sett á almenna forsorg. Hinvegin skulu hesi fólk hjálpast aftur á arbeiðsmarknaðin.

Tann rúmligi arbeiðsmarknaðurin gevur eisini pláss fyri starvsfólkum við breki. Endamálið má vera at integrera persónar við breki á vanliga arbeiðsmarknaðin á jøvnum føti við onnur starvsfólk.

Tá samanum kemur, er tað arbeiðsgevarin, sum rindar lønina til starvsfólkið. Grundleggjandi rindar ein arbeiðsgevari fyri ta tænastu ella veiting hann fær, eisini tá talan er um ein persón við breki.

Um tað almenna í eitt styttri tíðarskeið rindar lønina hjá hesum persónum, fara fleiri virki møguliga at taka ímóti arbeiðsfólki, ið bera brek. Eftir 3 ella 6 mánaðir skal arbeiðsgevarin so avgera, um hann vil varðveita persónin í arbeiði, men má tá sjálvur rinda lønina.

Tað grundleggjandi er, at arbeiðsgevarin rindar fyri ta tænastu, sum ein persónur við breki er førur fyri at veita honum. Um ein persónur við breki til dømis arbeiðir helvtina av tí, sum ein persónur við ongum breki arbeiðir, so fær hann hálva løn. Fyrimunurin við tí er eisini, at starvsfólkið, ið ber brek, tá verður virðismett á jøvnum føti við hini starvsfólkini. Hetta krevur tó, at avtala verður gjørd við fakfeløgini um, at persónar við breki fáa løn eftir førimuni.

Ger tað almenna eina skipan, sum hevur til endamáls at integrera persónar við breki á arbeiðsmarknaðin, er tað av týdningi, at skipanin er einføld við praktiskum loysnum.

**Vard størv**

Tað almenna eigur at arbeiða við at útvega fleiri vard størv. Tað er vert at umhugsa, um tað almenna skal hava eina skyldu til at taka fólk, ið bera brek, í vart starv, fyri at vera ein fyrimynd. Tað hevði gjørt mun, um fleiri almenn starvspláss tóku ein persón í part í vart starv.

Allir viðkomandi partar eiga at verða tiknir við í arbeiðið at gera arbeiðsmarknaðin rúmligari. Her verður hugsað um arbeiðsgevarar, yrkisfeløg, læknar osfr.

Tann fyribyrgjandi parturin eigur at raðfestast høgt, so at fólk ikki gevast at arbeiða orsakað av breki, um ein loysn kann finnast, so tey kunnu halda áfram. Kommunulæknarnir eiga at verða kunnaðir, so teir kunnu vera við í tí fyribyrgjandi arbeiðinum.

Politisku myndugleikarnir eiga at taka støðu til spurningin um, hvørt tað skal bera til at arbeiða niðursetta tíð, til dømis trý-fjórðings tíð, men tó fáa løn fyri fulla tíð. Tað hava verið ynski frammi um hendan møguleika, men enn hava myndugleikarnir ikki avgjørt, um hetta skal verða gjørligt.

## Tilmæli um arbeiðsmarknaðin:

- **Fólk við breki verða integrerað á vanliga arbeiðsmarknaðin, um hetta er gjørligt.**
- **Tað almenna eggjar virkjum til at taka fólk við breki í starv, við at veita fíggjarligan stuðul at byrja við.**
- **Ein møgulig framtíðar skipan, sum hevur til endamáls at integrera persónar við breki á arbeiðsmarknaðin, verður einføld við praktiskum loysnum.**
- **Fleiri arbeiðspláss verða útvegað til fólk, ið bera brek.**
- **Allir viðkomandi partar eiga at verða tiknir við í arbeiðið at gera arbeiðsmarknaðin rúmligari.**
- **Tað almenna gongur á odda í at útvega fleiri vard størv.**

## Viðgerð

**Brot úr 2. reglu í fyrimyndarreglunum:**
**Tjóðir hvør sær eiga at tryggja, at brekað fólk fáa munadygga heilsurøkt.**
**Í tilmælinum til 2. fyrimyndarreglu verður m.a. mælt til**

1. **Tjóðirnar hvør sær eiga at arbeiða fram ímóti verkætlanum, sum eru stýrdar av tvørfakligum bólkum av yrkislærdum fólki til tess tíðliga at staðfesta, meta um og viðgera brek. Hetta kann forða, minka ella fyribyrgja virkisdarv. Slíkar ætlanir eiga at tryggja, at brekað fólk og familja teirra heilt og fult eru uppí í øllum, tá ið talan er um ætlanir og eftirmeting.**
4. **Tjóðirnar hvør sær eiga at tryggja, at øll starvsfólk í heilsuverkinum hava nóg góða útbúgving og eru før fyri at veita brekaðum fólki ta neyðugu heilsurøktina, og at tey hava atgongd til teir viðgerðarhættir og ta tøkni, sum tørvur er á.**
6. **Tjóðirnar hvør sær eiga at tryggja, at brekað fólk fáa ta regluligu viðgerð og tann heilivág, sum teimum tørvar, til at halda ella bøta um støðu sína.**

Í 2003 vísti ein kanning av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum í Føroyum, ið Granskingardepilin stóð fyri, at eftirviðgerð og uppvenjing her hjá okkum er merkt av, at alt ov fá tilboð eru, og at eftirviðgerðin og uppvenjingin í nógvum førum er illa skipað. Hartil er ongin serviðgerð í Føroyum, eins og í Dianalund, Hornbæk og Vejlefjord í Danmark, sum eru serkøn í at venja upp eitt nú apopleksirakt og ferðsluskadd.

Kanningar í grannalondum okkara vísa, at framhaldandi uppvenjing og eftirviðgerð hevur stóran týdning fyri lívsdygdina hjá fólki, ið bera brek, í øllum aldri. Tað eru tvey hugtøk, ið verða brúkt: *habilitering og rehabilitering.* Habilitering er arbeiðið við avleiðingunum av viðføddum ella tíðliga íkomnum brekum ella sjúkum, meðan rehabilitering er arbeiðið við avleiðingunum av sjúkum ella brekum, ið eru komin seinni í lívinum.

Í 2002 sendi Trivnaðar-og heilsuráðið, ið sett varð av Almanna-og heilsumálaráðnum, spurnarbløð út til m.o. øll sjúklingafeløg og feløg fyri brekað. Ætlanin var at kanna umstøðurnar hjá fólki á ymsum økjum, og eisini viðgerðarmøguleikarnir skuldu kannast. Enn er eingin niðurstøða komin av

teirri kanningini, men øll limafeløgini í MBF vístu á tørvin á serkønari eftir- og viðlíkahaldsviðgerð. Fólk við breki hava tørv á lívslangari viðgerð við jøvnum millumbilum, annars koma ofta fylgisjúkur, ið kosta samfelagnum og ikki minst tí brekaða nógv. MBF hevur fleiri ferðir víst á, at tørvur er á viðgerðardeplum, men til vit fáa teir, kunnu almennir stovnar, s.s. sjúkrahús og ellis- og røktarheim, við teirra serkunnleika og góðu útgerð, vera við til at bøta um støðuna. Dømi um hetta er Bechtrew-viðgerðin á Klaksvíkar sjúkrahúsi, sum virkar væl. Afturat hesum kemur so økisterapiin, ið eigur at verða útbygd til at fevna um alt landið.

Almanna- og heilsumálaráðið eigur at umhugsa at seta ein tvørfakligan bólk til at útgreina tørvin á viðgerð í breiðastu merking. Hetta eigur at vera ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólkur, ið skal koma við uppskotum um, hvussu vit kunnu skipa habilitering og rehabilitering í Føroyum.

## Tilmæli um viðgerð:

- **Ein tvørfakligur bólkur verður settur at útgreina tørvin á viðgerð í breiðastu merking. Við hesum verður hugsað um, hvat kann gerast undir verandi karmum, og hvussu kunnu vit skipa habilitering og rehabilitering í framtíðini (uppskot til langtíðarætlan).**
- **Servitanin í Føroyum innan viðgerð og eftirviðgerð skal mennast, so sleppast kann undan at senda fólk av landinum at verða viðgjørd. Tann fakliga vitanin verður bygd upp her í landinum.**

## Tilmæli um raðfesting

Vit valdu sum sagt tey 6 økini sektor-ábyrgd, atkomu, bústaðarmøguleikar, útbúgving, arbeiðsmarknað og viðgerð. Hesi øki eru øll av alstórum týdningi. Vit vita, at arbeitt verður á summum av hesum økjunum, og tað er bert at vóna, at komið verður á mál, áðrenn langt um líður.

Tað er ógjørligt at koma á mál á øllum økjunum í senn. Vit hava tí valt at mæla til eina raðfesting av arbeiðinum við at seta í verk hesa virkisætlan. Vit mæla til, at økini **Atkoma**, **Bústaðarmøguleikar** og **Viðgerðarmøguleikar** verða tey øki, sum myndugleikarnir fyrst gera heildarloysnir fyri. Trupulleikarnir viðvíkjandi **Sektor-ábyrgd**, **Útbúgving** og **Arbeiðsmarknaði** verða síðani loystir.

## Eftirmæli

Tað týdningarmiklasta fyri, at ein virkisætlan skal eydnast, er, at allir viðkomandi partar eru við í arbeiðinum at gera eina slíka. Neyðugt er, at rættir myndugleikar, stovnar og feløg luttaka í hesum arbeiði, um ein virkisætlan skal vinna frama og harvið gera mun.

Vit vilja við hesum uppskoti til virkisætlan fyri brekað-politikkin í Føroyum gera okkara til, at tað almenna virksemið á brekað-økinum verður samskipað og meira langtíðarfreistað. Vit vóna, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum saman við fyrisiting síni arbeiðir víðari við hesum uppskoti til virkisætlan, við at senda tað til hoyringar og við at gera neyðugar broytingar og tillagingar. Tað er okkara vón, at virkisætlanin síðani verður løgd fyri Løgtingið sum uppskot til samtyktar, soleiðis at hendan ætlan kann verða samtykt sum neyðugar reglur fyri, hvussu tær almennu Føroyar eiga at fara við teimum borgarum, sum hava avmarkaðan førleika.

Komandi tíðir fara at vísa, um ST- fyrimyndarreglurnar, virkisætlanir og orðingar sum *Føroyar fyri øll* fáa okkum at broyta hugburð, so vit øll vísa í verki, at vit liva og virka í einum samfelag, har rúm er fyri og tørvur er á okkum øllum.

## Frágreiðing frá stýrisbólkinum um Ár teirra brekaðu 2003

# Inngangur

Tað var á altjóða handikap-degnum 3. desember 2002, at táverandi landssýrismaður í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, kunngjørdi, at Føroya landsstýri hevði tikið avgerð um, at 2003 skuldi verða Ár teirra brekaðu. Føroyar vórðu sostatt eitt av nógvum evropeiskum londum, sum settu viðurskifti teirra brekaðu á skránna í 2003.

Ein stýrisbólkur varð settur við umboðum fyri arbeiðsmarknaðin, Landsverk, MBF, Ráðið fyri brekað, Mentamálaráðið og táverandi Almannamálaráð til at standa fyri árinum. Uppgávan hjá stýrisbólkinum var vegna landsstýrismannin í almannamálum at:

- samskipa tað virksemið, sum fór fram í Ári teirra brekaðu
- skipa fyri ymsum slag av virksemi,
- upplýsa um Ár teirra brekaðu og virksemið í sambandi við Ár teirra brekaðu
- gera tilmæli um, hvussu fíggjarligi stuðulin frá landsstýrismanninum skuldi veitast

**Landsverk** var umboðað í stýrisbólkinum, tí hesin stovnurin hevur eina stóra byggitekniska vitan, sum er viðkomandi fyri fólk við avmarkaðum førleika. Landsverk tekur sær av byggifrøðiligum málum í breiðari merking fyri landsstýrið og kommunurnar.

**Arbeiðsmarknaðurin** var umboðaður í stýrisbólkinum við umboðum frá Føroya arbeiðsgevarafelag og Føroya arbeiðarafelag. Orsøkin til, at bæði arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar vóru umboðaðir, var ynskið um eina betri fatan av týdninginum av, at øll, eisini fólk við avmarkaðum førleika, skulu hava atgongd til arbeiðsmarknaðin.

**Meginfelag teirra brekaðu** er brúkarafelag teirra brekaðu í Føroyum. Við tilsamans 24 limafeløgunum hevur MBF gott samband við tey fólk, sum á onkran hátt hava avmarkaðan førleika. Harumframt hevur felagið drúgvar royndir at virka fyri at bøta um kor teirra brekaðu. At bøta um kor teirra brekaðu er júst endamálið við Ári teirra brekaðu, og royndirnar og kunnleikin hjá MBF vórðu sostatt mett at vera hent at hava í stýrisbólkinum.

**Ráðið fyri brekað** var umboðað í stýrisbólkinum við tveimum umboðum. Í Ráðnum fyri brekað sita umboð fyri almennar myndugleikar, kommunufeløgini og brúkararnar. Ráðið fyri brekað hevur til uppgávu at geva landsstýrismanninum og øðrum almennum myndugleikum ráð í málum, sum hava týdning fyri brekað, og av sínum eintingum taka upp mál, sum viðvíkja brekaðum.

**Mentamálaráðið** umsitur m.a. undirvísingarmál, mentamál umframt ítrótt og annað frítíðarvirksemi. Hetta eru øki, sum eru av avgerandi týdningi í tilveruni hjá tí einstaka menniskjanum. Øll hava rætt til útbúgving, og øll eiga at hava atgongd til tey mentanartilboð og frítíðartilboð, sum finnast í samfelagnum. Eisini á hesum økjum skulu børn, ung og vaksin við avmarkaðum førleika hava eins møguleikar og onnur.

**Almannamálaráðið** var umboðað í stýrisbólkinum, tí tað er landsstýrismaðurin í almannamálum, sum hevur ábyrgd av brekað-økinum. Tað er tískil í Almannamálaráðnum, at øll mál, sum beinleiðis viðvíkja brekaðum, verða umsitin.

Í stýrisbólkinum sótu:

**Doris Hansen** fyri Mentamálaráðið, forkvinna
**Malan Johansen** fyri Føroya arbeiðsgevarafelag
**Ingeborg Vinther** fyri Føroya arbeiðarafelag. Varalimur var **Georg F. Hansen.**
**Suni Dalsgaard** fyri Landsverk
**Marjun Sigurðsdóttir** fyri MBF. Varalimur var **Jórun Poulsen**.
**Tommy Petersen** fyri Ráðið fyri brekað, sum luttók í arbeiðinum til august 2003, tá hann fór av landinum í arbeiðsørindum
**Steinbjørn Jacobsen** fyri Ráðið fyri brekað
**Kristianna Winther Poulsen** fyri Almannamálaráðið til 1. september 2003, tá **Súsanna Nordendal** tók við sum umboð fyri Almannamálaráðið. Umboðið fyri Almannamálaráðið virkaði eisini sum skrivari í stýrisbólkinum.

Stýrisbólkurin hevði regluligar fundir at fyrireika tiltøk í árinum, og at viðgera umsóknir um fíggjarligan stuðul.

Sum slagorð avgjørdi stýrisbólkurin at nýta setningin Føroyar fyri øll?, har spurnartekinið skuldi minna okkum á tey, sum orsakað av avmarkaðum førleika ikki hava atgongd til tað føroyska samfelagið.

Avgjørt varð at prenta plakat og postkort við mynd, sum Símun Poulsen úr Klaksvík hevði teknað. Símun Poulsen ber sjálvur brek. Plakatin við slagorðinum var so ímyndin av Ári teirra brekaðu, og bleiv nógv nýtt á øllum teimum tiltøkum, sum stýrisbólkurin var við til, og øðrum við.

Við hesi frásøgn um Ár teirra brekaðu 2003 ynskir stýrisbólkurin at greiða frá um tey tiltøk, sum vit beinleiðis ella óbeinleiðis vóru við í.

Doris Hansen, forkvinna

| | | |
|---|---|---|
| Malan Johansen | Ingeborg Vinther | Suni Dalsgaard |
| Marjun Sigurðsdóttir | Steinbjørn Jacobsen | Kristianna Winther Poulsen |

## Tiltøk, sum Stýrisbólkurin fyri Ár teirra brekaðu skipaði fyri

Tiltøk, sum Stýrisbólkurin fyri Ár teirra brekaðu skipaði fyri, vóru:

- Ymiskt virksemi á summarstevnum kring landið, so sum fyrilestrar, framsýningar o.a.
- Spurnarkanning um atkomu í kommununum
- Evnisdegur fyri fakfólk um tilboð til børn, ið bera brek
- Vitjan á Eirargarði
- Áheitan á granskingarstovnar um at granska í spurningum, sum viðvíkja fólki, ið bera brek
- Ráðstevna í Norðurlandahúsinum um rættindi hjá brekaðum og fyrimyndarreglurnar hjá ST fyri fólk, ið bera brek
- Tilmæli til landsstýrismannin í almannamálum um umsóknir um fíggjarligan stuðul til tiltøk

Við teimum royndum og teimum upplýsingum, sum limirnir í stýrisbólkinum fingu í árinum, og sum fleiri av okkum høvdu frammanundan, sum grundarlagi, hava vit gjørt eitt uppskot til virkisætlan fyri brekað-økið, sum politisku myndugleikarnir vónandi taka til sín og arbeiða eftir komandi árini. Fyrimyndarreglurnar hjá ST um at útvega javnslíkar møguleikar fyri fólk, ið bera brek, er grundarlagið undir hesum uppskoti til virkisætlan, sum er at finna fremst í hesum hefti.

## Summarstevnur í 2003

Í samstarvi við kommunur, sjálvboðin, áhugafelagsskapir og onnur skipaði stýrisbólkurin fyri fyrilestrum og framsýningum á 4 stevnum á sumri 2003.

**Norðoyastevna 2003**
Á Norðoyastevnu var fyrilestur í Býráðshøllini á Hvítusunnu, 29. mai. Hetta var eitt av teimum fyrstu tiltøkunum á Norðoyastevnu 2003. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sum eisini var limur í stýrisbólkinum, beyð vælkomin. Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, helt fyrilestur um brekað og fordómar. Á sama fundi greiddi Marjun Kálvalíð frá teimum royndum, hon hevur, bæði sum avvarðandi og sum sosialráðgevi í Danmark og í Føroyum. Doris Hansen, forkvinna í stýrisbólkinum, tók samanum fundin.

Eisini var framsýning á Norðoyastevnu, sum vardu verkstøðini skipaðu fyri. MBF hevði framsýning, og felagið Hoyrn var virkið. Vert er at nevna, at á somu Norðoyastevnu helt Marjun Sigurðsdóttir, táverandi forkvinna í MBF, miðnáttarrøðu, og Leila Solmunde, sum tá var forkvinna í Giktafelagi Føroya, helt eisini røðu. So Ár teirra brekaðu var av røttum sett á skránna fyri Norðoyastevnuna 2003.

**Jóansøka 2003**
Stýrisbólkurin skipaði fyri fyrilestri í Trongisvágs skúla í sambandi við Jóansøku 2003. Pauli Einarsson, umboð fyri Tvøroyar býráð, beyð vælkomin. Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, helt fyrilestur um brekað og fordómar. Elin Vang, avvarðandi, hevði framløgu. Tommy Petersen, formaður í Ráðnum fyri brekað og limur í stýrisbólkinum, tók samanum fundin.

Eisini á Jóansøku var framsýning, sum Vardi verkstaðurin á Bakka og limafeløgini í MBF stóðu fyri. Framsýningin var í Trongisvágs skúla. Vert er at nevna, at M’as Blues Band spældi til setanina.

**Vestanstevna 2003**
Fólk úr stýrisbólkinum hongdu listaframsýning upp í tí nýggja barnagarðinum í Sandavági. Framsýnarar vóru Símun Poulsen, Magni Mikkelsen og Hermund Zachariassen.

MBF hevði framsýning við tilfari frá limafeløgunum, og formaðurin í MBF helt røðu í Løgmansgarðinum. Eisini kann nevnast, at MBF valdi allar sangirnar, sum kórið sang á Vestanstevnu. Eftir fólkafundin spældi M'as Blues Band.

Kontaktfólk hjá stýrisbólkinum og MBF vóru kommunupolitikarar, Sandavágs Ítróttarfelag, og fólk á staðnum, sum hava tilknýti til MBF. Tey stóðu fyri tí praktiska arbeiðinum.

**Varmakelda 2003**
Umboð fyri stýrisbólkin vóru eisini á Varmakeldu, har tey skipaðu fyri framsýning. Formaðurin í MBF helt setanarrøðuna, og formaðurin í Javna helt røðu sunnudagin. Ein rampa bleiv gjørd til tess at bøta um atkomumøguleikarnar fyri fólk í rullustóli.

## Annað virksemi

**Vitjan á Eirargarði 16A og 16BN** (8.mai 2003)
Limir í stýrisbólkinum og aðalstjórin í Almannamálaráðnum vitjaðu á bústovninum Eirargarði hin 8. mai 2003. Orsøkin til vitjanina var, at vit høvdu fingið áheitan frá avvarðandi til búfólk á Eirargarði um at seta okkum inn í viðurskiftini hjá búfólkunum á Eirargarði.

Á Eirargarði eru 3. deildir við 5 fólkum á hvørjari. Harumframt varð arbeitt við einum sambýli til tvey fólk, sum eftir ætlan skuldi verða liðugt í juni 2003. Á einari deild búgva gomul fólk. Tey flestu av teimum sita í koyristóli. Ein deild er innrættað til fjølbrekað fólk, ið øll brúka koyristól, og á triðju deildini búgva fólk, ið hava rættiliga ymiskan tørv.

Starvsfólkini greiddi frá og vístu á viðurskifti, ið tey kundu hugsað sær vórðu broytt í Ári teirra brekaðu. Serliga vóru tað atkomu- og uttanduraviðurskiftini, tey vóru ónøgd við. Tey ynsktu, at ein útgongd varð gjørd í sunnara enda, og at oljugrús var lagt á uttanfyri, so gott var at sleppa inn. Somuleiðis vildu tey hava møguleika at seta seg vestanfyri bygningin saman við búfólkunum, men so er neyðugt at gera nakrar smávegis broytingar utanfyri.

Víst varð eisini á, at tað hevði verið ein stórur lætti hjá øllum, um ein góð gøta til koyristólar varð gjørd oman á Velbastaðvegin gjøgnum tað stykkið, ið liggur beint niðanfyri Eirargarð. Hetta hevði lætt nógv um, tá túrar skulu gerast, t.d. í Sandagerð.

Innandura var ynski um at fáa eitt stórt wc, ið er egnað til brekað uppi á. Annars varð víst á tørvin á viðlíkahaldi, so sum máling og ymsum smáum ábøtum. Tey vóru fegin um skinnararnar í loftinum niðriundir, ið verða brúktir at flyta búfólkið úr songini ella stólinum og inn á baðirúmið. Tílíkar skinnarar ynsktu tey eisini at fáa uppiá.

**Áheitan um at granska í viðurskiftum hjá fólki við avmarkaðum førleika**

Stýrisbólkurin sendi áheitanir til Søgu- og samfelagsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya og til Granskingardepilin fyri økismenning í Klaksvík um at hava í huga tey, ið bera brek, tá granskingarætlanir verða lagdar til rættis.

## Evnisdagur fyri fakfólk, sum hava við børn, ið bera brek, at gera. 23. oktober 2003

Skipað varð fyri einum evnisdegi fyri fakfólk, sum hava við børn, ið bera brek, at gera. Ætlanirnar við degnum vóru:

- at lýsa trupulleikarnar á økinum fyri avvarðandi landsstýrismonnum og at vísa á møguleikar at betra tænasturnar
- at betra samstarvið millum viðkomandi fakbólkar

Hesir stovnar vórðu bodnir at taka lut á evnisdegnum:

- Almannastovan
- Sernámsfrøðiliga ráðgevingin á Sernámsdeplinum
- Hjálpartólamiðstøðin
- Økisdeildirnar hjá Almannastovuni í Klaksvík, Runavík og á Tvøroyri
- Barnalæknarnir á Landssjúkrahúsinum
- MBF
- Embætisfólk úr Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum og Familju- og heilsumálaráðnum
- Landsstýrismenn í mentamálum, almannamálum og familju- og heilsumálum

Tilsamans luttóku um 30 fólk á evnisdegnum, sum varð hildin í Starvsmannafelagshølunum. Ásvør Skaalum, sálarfrøðingur, stýrdi fundinum.

Kjakast varð um, hvussu komast kann fram til loysnirnar á trupulleikum, sum eru orsakað av vantandi mannagongdum og vantandi samskifti millum aðalráð og stovnar. Í kjakinum varð komið inn á, hvørjir høvuðsspurningarnir og høvuðstrupulleikarnir í arbeiðinum við børnum, ið bera brek, vóru. Niðanfyri eru nøkur boð um trupulleikarnar á økinum.

- Vantandi politisk støðutakan til, hvør hevur ábyrgd av trupulleikunum á brekað-økinum (Almanna- og heilsumálaráðið, Mentamálaráðið ella kommunalu myndugleikarnir)
- Vantandi politisk støðutakan til, hvørji tilboð samfelagið eigur at hava til brekað
- Vantandi samskipan av tænastum til brekað børn
- Einki samstarv millum myndugleikarnar

- Vantandi savnan av serkunnleikanum á økinum
- Vantandi framhald frá tí at brekið verður staðfest og frameftir
- Vantandi heildarætlan

Evnisdagurin var samstundis partur av grundarlagnum undir at geva út ein bókling til foreldur, sum fáa eitt brekað barn. Ein tílíkur bóklingur kom út í 1985, og tað var MBF, sum stóð fyri hesari útgávu. Nú má stundin vera komin at gera ein nýggjan bókling við dagførdum upplýsingum.

MBF eigur saman við Almanna- og heilsumálaráðnum og øðrum viðkomandi pørtum at gera ein tílíkan bókling og geva hann út.

## Spurnarkanning um atkomu hjá rørslutarnaðum í kommununum

Allar tær 48 kommunurnar, sum vóru í Føroyum í 2003, hava fingið spurnarblaðið sendandi. Tilsamans 35 kommunur, ella 73%, svaraðu spurnarblaðnum og sendu okkum tað aftur.

Støðd á kommununum, sum hava svarað:

| | |
|---|---|
| Kommunur 0-100 íbúgvar: | 6 |
| Kommunur 101-400 íbúgvar | 8 |
| Kommunur 401-1000 íbúgvar | 11 |
| Kommunur 1001 ella fleiri íbúgvar | 10 |

**Bygdir upp til 400 íbúgvar**

Tað er ikki so væl vorðið við atkomumøguleikum fyri rørslutarnað í kommunum, sum hava upp til 400 íbúgvar. Skúlar undantikið eru næstan eingir almennir bygningar, so sum stovnar í hesum bygdum, og mentanarlig tiltøk og frítíðarvirksemi yvirhøvur er avmarkað fyri øll, eisini tey, sum hava fullan førleika.

Tær flestu av teimum minstu kommununum gera vart við, at eingir rørslutarnaðir íbúgvar eru í kommununi.

**Bygdir og býir við fleiri enn 400 íbúgvum**

Nærum allar kommunurnar svara spurningum 1 til 6 játtandi (sí skjal 1: Spurnarblað um atkomumøguleikar hjá rørslutarnaðum, síða 34).

Tað er eingin skipað kunning um atkomumøguleikar í nøkrum av kommununum. Tær flestu kommunurnar gera tó vart við, at kommunuskrivstovurnar ella kunningarstovurnar hava eina vitan um møguleikarnar og kunnu veita kunning um atkomumøguleikarnar.

Umleið 80% av kommununum meta, at atlit verða tikin til atkomumøguleikar, tá virksemi verður lagt til rættis.

Tann seinasti spurningurin í spurnarblaðnum er: Hvussu meta tygum, at tygara kommuna tekur sær av teimum rørslutarnaðu? Fleiri av teimum smærru kommununum velja ikki at svara hesum spurningi, og hetta eru eisini kommunur, sum ofta ongar rørslutarnaðar íbúgvar hava. Fleiri svara ”kundi verið betri”, ”eftir førimuni”, ella ”vit royna”. Bert tvær av kommununum við færri enn 400 íbúgvum kunnu beinleiðis vísa á serlig tiltøk fyri rørslutarnað, og tvær kommunur siga beinleiðis, at tað ikki er gott.

Av teimum størru kommununum eru tvær, sum ikki svara spurninginum. Nærum allar meta, at tær taka sær væl av teimum rørslutarnaðu, meðan einstakar svara, at tær royna eftir førimuni, men at tað óivað kundi verið betri.

| 0-100 íbúgvar | | 101-400 íbúgvar | | 401-1000 íbúgvar | | 1000+ íbúgvar | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bøur | 89 | Skálavík | 175 | Hvalba | 771 | Miðvágur | 1050 |
| Mykines | 19 | Oyndafjørður | 176 | Skopun | 495 | Gøta | 1043 |
| Elduvík | 88 | Kunoy | 135 | Hvannasund | 450 | Fuglafjørður | 1600 |
| Mikladalur | 74 | Hvalvík | 387 | Skála | 711 | Runavík | 2580 |
| Húsar | 61 | Hósvík | 288 | Eiði | 730 | Vágur | 1500 |
| Skúvoy | 60 | Kirkjubøur | 230 | Sumba | 403 | Nes Kommuna | 1197 |
| | | Hov | 133 | Leirvík | 875 | Vestmanna | 1230 |
| | | Nólsoy | 288 | Sandur | 590 | Tvøroyri | 1869 |
| | | | | Sandavágur | 721 | Tórshavn | 18420 |
| | | | | Sørvágur | 980 | Sjóvar Kommuna | 1047 |
| | | | | Sunda Kommuna | 489 | | |

Talvan vísir kommunurnar í 2003, bólkaðar eftir íbúgvatali.

**1. Skúlar**

Av teimum 35 kommunum, sum hava svarað, er tað bara ein, sum ikki hevur svarað hesum spurningi. Hetta kann vera ein kommuna, ið ikki hevur skúla. Talan er í øllum førum um eina lítla kommunu við minni enn 100 íbúgvum.

Sum heild ber til at siga, at tær størru kommunurnar (í hesum føri við fleiri einn 400 íbúgvum) í stóran mun hava skúlar, har rørslutarnað hava atgongd. Bert ein kommuna hevur ikki skúla við atgongd fyri rørslutarnað. Hinvegin stendur verri til við hesum viðurskiftum hjá teimum minni

kommunum. Her hava bara umleið 46% av skúlunum atgongd fyri rørslutarnað. Orsøkin kann vera, at inntøkugrundarlagið hjá teimum smærri kommunum er avmarkað.

**2. Lækni**

Tvær av teimum 14 smáu kommunum (færri enn 400 íbúgvar) hava svarað hesum spurningi. Allarhelst tí tær 12 smáu kommunurar ikki hava lækna í kommununi. Av teimum tveimum, sum hava svarað, hevur tann eini lækni atgongd fyri rørslutarnað.

Heldur ikki allar tær stóru kommunurnar hava svarað spurninginum. Men hjá teimum kommunum, sum hava svarað, hava allir kommunulæknarnir atgongd fyri rørslutarnað.

**3. Fysio/ergoterapi**

Her hava 7 av kommunum svarað, helst tí at tað eru tær kommunur, sum hava hetta tilboðið. Talan er um tær stóru kommunurnar við fleiri enn 1000 íbúgvum (tó ein kommuna við fleiri enn 400 íbúgvum). Allir fysio/ergoterapeutarnir í hesum kommunum hava atgongd fyri rørslutarnað.

**4. Handlar**

Her hava 27 av teimum 35 spurdu kommununum svarað. 8 av teimum smærru kommununum við færri enn 400 íbúgvum hava ikki svarað. Orsøkin er møguliga, at eingir handlar eru í kommununi. Av teimum, sum hava svarað, hava 85 prosent av handlunum atgongd fyri rørslutarnað.

**5. Bókasavn**

Ikki allar kommunur hava bókasavn. 17 kommunur hava svarað spurninginum, og av hesum hava 16 fleiri enn 400 íbúgvar. Øll bókasøvnini hava atgongd fyri rørslutarnað. Tó hava 5 av bókasøvnunum í teimum størstu kommununum (fleiri enn 1000 íbúgvar) ikki atgongd fyri rørslutarnað.

**6. Ítróttarhøll**

Tað eru bara kommunur við fleiri enn 400 íbúgvum sum hava svarað spurninginum, allarhelst tí at tað eru tær størru kommunurnar, sum hava ítróttarhallir. Allar hallir hava atgongd fyri rørslutarnað.

**7. Frítíðarvirksemi, mentanarlig tiltøk og flutningsmøguleikar**

Umleið helvtin av hesum støðum hevur atgongd fyri rørslutarnað. Og støðan er best hjá teimum størru kommununum (fleiri enn 400 íbúgvar).

**8. WC**

Tá talan er um atgongd hjá rørslutarnaðum til wc, er støðan ikki góð. Bara 34% av teimum almennu wc'unum hava atgongd fyri rørslutarnað. Bara 12 kommunur hava svarað spurninginum, og um tær 23 kommunurnar, sum annars hava svarað spurnarblaðnum, ikki hava svarað hesum spurningi, tí tær einki alment wc hava, er støðan sum heild vánalig á hesum øki.

**9. Sum heild**

Sum heild kann sigast, at tað stendur hampuliga væl til við atgongd fyri rørslutarnað, tá talan er um skúlar, læknar, fysio/ergoterapi, handlar og ítróttarhallir í kommununum. Og tað er serliga í teimum størru kommununum (fleiri enn 400 íbúgvar), at hesi viðurskifti eru í lagi.

Verri stendur til, tá talan er um bókasøvn, frítíðarvirksemi, mentanarlig tiltøk, flutningsmøguleikar og almenn wc. Eisini á hesum økjum eru tað tær størru kommunurnar, sum eru betur fyri, enn tær smærru, tó at støðan ikki er nøktandi í teimum størru kommununum heldur.

## Evnisdagur um rættindi hjá brekaðum og fyrimyndarreglurnar hjá ST fyri fólk, ið bera brek

Tann 5. oktober 2004 skipaði stýrisbólkurin fyri evnisdegi um rættindi hjá brekaðum og um fyrimyndarreglurnar hjá ST. Dagurin varð hildin í Norðurlandahúsinum, og skráin var hendan:

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00: | Doris Hansen, formaður í stýrisbólkinum fyri Ár teirra brekaðu, beyð vælkomin. |
| Kl. 13.05: | Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, setti dagin. |
| Kl. 13.15: | Leila Solmunde, formaður í MBF: Handikap-politikkur er samfelagspolitikkur. |
| Kl. 13.40: | Doris Hansen: Hvat kunnu fyrimyndarreglurnar brúkast til? |
| Kl. 13.55: | M'as Blues Band spældi |
| Kl. 14.10: | Steðgur. Høvi var at síggja framsýning um atkomuviðurskifti í forhøllini. Hjálpitólamiðstøðin og MBF skipaðu fyri. |
| Kl. 14.40 | Marjun Bæk, prestur: "..eg havi einki menniskja.."(Luk 5,7). Hugleiðing. |
| Kl. 15.10: | Halgir Winther Poulsen, sakførari: Fevna mannarættindi um brekað-rættindi? |
| Kl. 15.50: | Bjørt Samuelsen tók samanum. |
| Kl. 16.10: | Dagurin endaði. |

Bjørt Samuelsen, fjølmiðlakvinna, stýrdi degnum og tók samanum. Teknmálstulkar tulkaðu tað, ið varð sagt. Lars Ødegård, aðalskrivari í Norsk Handikapforbund, hevði eisini játtað at luttaka, men hann gav avboð dagin fyri. Av hesi orsøk heittu vit á Jóanes Jakobsen um at luttaka við M'as Blues Band, og hann játtaði alt fyri eitt. Fyri hetta hava Jóanes og hansara fólk nógv rós uppiborið.

Vit sendu einar 100 innbjóðingar út til politikarar, stovnar og feløg, sum vit hildu áttu at luttaka á degnum. Dagurin eydnaðist væl, og undirtøkan var stór: stóri salurin í Norðurlandahúsinum var fullsettur.

Tiltakið var alment, og luttøkan var ókeypis.

## Tiltøk, sum fingu stuðul frá landsstýrismanninum í almannamálum eftir tilmæli frá stýrisbólkinum

Ein av uppgávunum hjá stýrisbólkinum var at gera tilmæli um, hvussu fíggjarligi stuðulin frá landsstýrismanninum skuldi veitast.

Tey, sum fingu fíggjarligan stuðul til tiltøk í Ári teirra brekaðu, vóru hesi:

**Psoriasisfelagið og Giktafelag Føroya** fingu kr. 5.400,- til fyrilestrar um psoriasis og lívsvirði og um psoriasis-gikt og lívsvirði. Tað vóru læknarnir Hugh og Eva Zacharia, sum hildu hesar fyrilestrar.

**Giktafelag Føroya** fekk kr. 6.320,- til fyrilestrarøð um Giktafelag Føroya og um, hvussu Heimarøktin kann nýta hjálpartól sum fyribyrging, bæði hjá brúkarum og hjá Heimarøktini sjálvari. Fyrilestrahaldarar vóru Anna Petersen, ergoterapeutur, og Leila Solmunde, brúkari.

**Nýrafelagið** fekk kr. 1.939,25 til fund fyri sjúkrahússtarvsfólk og ein almennan fund um livikorini hjá nýrasjúkum ella dialysusjúklingum í Føroyum. Formaðurin, næstformaðurin og ein ráðgevi hjá Nyreforeningen í Danmark luttóku á fundunum.

**Heilafelagið** fekk kr. 8.444,- til kunnandi fund um kanning av livikorunum hjá apopleksiraktum í Føroyum. Endamálið við fundinum var at koma á tal við lands- og kommunalpolitikarar, fakfólk og avvarðandi.

**Diabetesfelag Føroya** fekk kr. 10.000,- til tiltak í sambandi við Altjóða diabetesdagin, sum er 14. november. Norski diabetes-professarin dr. med. Jak Jarwell, og formaðurin í norska diabetesfelagnum, Sindre Børke, luttóku í tiltakinum.

**Javni** fekk kr. 10.000,- til ráðstevnu við heitinum Skúlin fyri øll – hvussu fáa vit hann? Endamálið við ráðstevnuni var, at skúlin fyri øll skal verða – og vera fyri øll! Fyrilestrahaldararnir vóru øll serkøn skúlafólk, ið lýstu støðu og royndir á skúlaøkinum.

**M’as Blues Band** við Jóannesi Jakobsen fekk kr. 15.000,- til skúlakonsertferð kring landið. Ætlanin við skúlakonstertunum var at røkka út til tey ungu, áðrenn fordómar fáa fastatøkur og harvið skerja møguleikan hjá teimum at viðurkenna, at lívið er í ymsum litum og útgávum.

**Meginfelag teirra brekaðu** fingu kr. 24.000,- til evnisviku fyri allar fólkaskúlar í landinum. Evni var “At vera brekaður, at vera øðrvísi enn tey flestu”. Endamálið við evnisvikuni var at økja um kunnleikan til hesi menniskju, soleiðis at vit skilja tey betur, og okkum sjálvi, um vit koma í eina líknandi støðu.

**Parkinsonfelagið** fekk kr. 18.167,- til evnisdag um parkinsonsjúkuna. Fyrilestrahaldarar vóru Erik Dupont, yvirlækni og serlækni í parkinsonsjúkuni, og Vivi Dupont, sjúkrarøktarfrøðingur við servitan innan parkinsonsjúkuna. Endamálið við evnisdegnum var at virka fyri betri liviumstøðum til sjúklingar, og fyri øktari vitan um sjúkuna hjá røktarstarvsfólki.

**Føroya Blindafelag** fekk kr. 22.800,- til at gera upplýsandi tilfar um blind og sjónveik. Lýsingarnar skuldu sendast í SVF seinastu mánaðirnar í 2003.

**Brian Gilligan** fekk kr. 5.000 fyri at geva út fløguna Til Arngrím. Brian Gilligan starvaðist eitt skifti á verkhúsinum Virkni. Har sá hann, hvussu góða ávirkan, stillur tónleikur hevði á fólk við samskiftistrupulleikum orsakað av avmarkaðum førleika. Tónleikurin á fløguni er millum annað ætlaður hesum fólkum.

**Deyvafelag Føroya** fekk kr. 15.000,- til teknmálstulkingar av føroyskum sjónvarpssendingum.

**Skjal 1:**

**Spurnarblað um atkomumøguleikar hjá rørslutarnaðum**

Navn á kommunu:____________________________________________

1. Hvussu nógv fólk búgva í kommununi?

2. Hvussu nógv rørslutarnað búgva í kommununi (um møguleiki er fyri at svara hesum spurningi)?

3. Hava tey rørslutarnaðu atgongd til:

3.1. Skúla?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Er skúlin í býnum / bygdini?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Viðmerkingar:__________________________________________________________________

__________________________________________________________________________________

__________________________________________________________________________________

3.2. Lækna?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Er læknin í býnum / bygdini?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Viðmerkingar:__________________________________________________________________

__________________________________________________________________________________

__________________________________________________________________________________

3.3. Fysio- ella ergoterapeutiska viðgerð?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Er fysio- ella ergoterapeutiska viðgerðin í býnum / bygdini?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Viðmerkingar:______________________________________________________________
________________________________________________________________________
________________________________________________________________________

3.4. Handlar?

| | | | |
|---|---|---|---|
| Klædnahandlar | Ja □ | Nei □ | Veit ikki □ |
| Matvøruhandlar | Ja □ | Nei □ | Veit ikki □ |
| Aðrar handlar | Ja □ | Nei □ | Veit ikki □ |

Eru handlarnir í býnum / bygdini?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Viðmerkingar:______________________________________________________________
________________________________________________________________________
________________________________________________________________________

3.5. Bókasavn?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Er bókasavnið í býnum / bygdini?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Viðmerkingar:______________________________________________________________
________________________________________________________________________
________________________________________________________________________

3.6. Ítróttarhøll?

Ja □ Nei □ Veit ikki □

Er ítróttarhøllin í býnum / bygdini?

Ja ☐ Nei ☐ Veit ikki ☐

Viðmerkingar:______________________________________________________________________
________________________________________________________________________________
________________________________________________________________________________

3.7. Annað frítíðarvirksemi?

Ja ☐ Nei ☐ Veit ikki ☐

Viðmerkingar:______________________________________________________________________
________________________________________________________________________________
________________________________________________________________________________

3.8. Mentanarlig tiltøk?

Ja ☐ Nei ☐ Veit ikki ☐

Viðmerkingar:______________________________________________________________________
________________________________________________________________________________
________________________________________________________________________________

4. Hava tey rørslutarnaðu atgongd til nakað alment wc?

Ja ☐ Nei ☐ Veit ikki ☐

Viðmerkingar:______________________________________________________________________
________________________________________________________________________________
________________________________________________________________________________

5. Eru nakrir flutningsmøguleikar fyri rørslutarnað?

Ja ☐ Nei ☐ Veit ikki ☐

Viðmerkingar:______________________________________________________________________
________________________________________________________________________________
________________________________________________________________________________

6. Hvussu hava tey rørslutarnaðu møguleika at kunna seg um atkomumøguleikar?

Greiðið frá:______________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

7. Hava tygum annars atkomumøguleikar hjá fólki við avmarkaðum førleika í huga, tá tygum leggja til rættis virksemið í kommununi?

Greiðið frá:_____________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

8. Hvussu meta tygum, at tygara kommuna tekur sær av teimum rørslutarnaðu?

Greiðið frá:_____________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

Vinaliga sendið svarið til:

**Almannamálaráðið**
Ár teirra brekaðu 2003
Eirargarð 2
100 Tórshavn

í seinasta lagi 20. februar 2004.

Tað ber eisini til at svara spurnarblaðnum á www.amr.fo